UTTAN ÚR HEIMI

## Hann heldur seg vera Guð

Forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, heldur, at George W. Bush, forseti, heldur seg kunna liva og láta, sum hann vil. Bush heldur seg vera Guð, sigur Mugabe.

– Vit eru tvungin til at góðtaka ein nýggjan átrúnaðarligan politikk, hvørs grundsetningur er, at tað er bara ein politiskur Guð, George W. Bush, og at Tony Blair er profetur hansara, segði Mugabe á aðalfundinum hjá ST fyrradagin. Bæði USA og Bretland hava sett handilstiltøk í verk ímóti Zimbabwe, og tað var ivaleyst tað, sum fekk Mugabe at taka so dýran til. Men Mugabe fýltist eisini á, at bretska stjórnin samstarvar við andstøðuna í Zimbabwe.

– Enn einaferð hava vit sæð, at lógloysingurin Blair og harri hansara í Washington halda, at Guð hevur latið teimum upp í hendi at stýra heiminum, segði Mugabe og legði afturat, at fyrrverandi hjálandaharrar eiga ikki at læra onnur, hvat demokrati er.

## Gloppa dyrnar fyri Libya

ES-londini eru vorðin samd um at taka handilstiltøkini ímóti Libya av, nú stýrið í Tripoli er sinnað at samstarva við Vesturheimin. Tann endaliga avgerðin verður kortini ikki tikin fyrr enn seinni.

Italia vil ikki einans hava handilstiltøkini sett úr gildi. Italia hevur stórar trupulleikar av flóttafólki, sum koma um Miðjarðarhavið, og stjórnin í Rom vil tí eisini hava ein sáttmála við Libya um flóttafólkini. Sum samsýning hava teir italsku myndugleikarnir boðið sær til at lata Libya ymsa tekniska útgerð, so myndugleikarnir har kunnu halda eygað við flóttafólkunum, áðrenn tey leggja frá landi.

Fyrr í vikuni kunngjørdi amerikanska stjórnin, at hon hevur sett handilstiltøkini ímóti Libya úr gildi, aftur fyri at landið hevur slept øllum ætlanum um at útvega sær hópoyðingarvápn.

## Póland fær einki endurgjald

Herfyri samtykti polska tjóðartingið at reisa endurgjaldskrav ímóti Týsklandi fyri tann skaða, sum týskararnir gjørdu í Pólandi undir seinna heimsbardaga. Í samtyktini stóð, at Týskland eigur at rinda endurgjald fyri ágang, herseting og fólkamorð undir heimsbardaganum.

Men Póland fær ikki eitt oyra í endurgjaldi, sigur týski kanslarin, Gerhard Schrøder. Tvørturímóti heldur hann uppá, at pólendingar hava als ikki grundarlag fyri at reisa eitt slíkt krav, og at orðalagið í samtyktini er ikki sambæriligt við veruleikan. Polska stjórnin hevur eisini sagt, at hon tekur ikki undir við samtyktini hjá tinginum, men kortini skal málið umrøðast, tá polski forsætisráðharrin, Marek Belka, hittir Schrøder mánadagin.

Ein meiningakanning í Pólandi hevur víst, at 64 prosent av pólendingunum taka undir við kravinum hjá tinginum um endurgjald.

## Ósemja um sparingar

Svenska stjórnin noyddist í gjár at sleppa einari umfatandi ætlan um sparingar á hernaðarøkinum. Stjórnin hevði sett sær fyri at fáa eina breiða semju saman við andstøðuni, eins og vanliga verður gjørt í Danmark, tá talan er um hernaðarmál, men tað miseydnaðist.

Stjórnin ætlaði at leggja fleiri herstøðir saman, tí á tann hátt kundi herurin spara lønarútreiðslur til umleið 5.000 fólk. Men andstøðan segði kortanei, og tí endaði tað við einari minni spariætlan. Upprunaliga ætlanin bar í sær, at ríkiskassin skuldi spara tríggjar milliardir krónur tey næstu trý árini. Andstøðan vil eisini spara tríggjar milliardir, men yvir eitt longri tíðarskeið.

Svenski ríkiskassin brúkar í ár 38 milliardir svenskar krónur til hernaðarútreiðslur.




# Avrættaðar

**Í gjár kunngjørdu burturflytararnir í Irak, at teir høvdu avrættað Simonu Pari og Simonu Toretta**

BURTURFLYTINGAR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tær báðar 29 ára gomlu italsku kvinnurnar vóru farnar til Irak at arbeiða fyri ein italskan hjálparfelagsskap. Tann 7. september vórðu tær burturfluttar í Bagdad, og gjáranáttina kunngjørdi ein islamistisk heimasíða, at burturflytararnir høvdu tikið tær av døgum.

Tað var felagsskapurin Jihad, sum burturflutti tær báðar kvinnurnar. Felagsskapurin kravdi, at Italia skuldi taka sínar hermenn úr Irak, men stjórnin hjá Silvio Berlusconi, forsætisráðharra segði nei. Svarið úr Irak kom gjáranáttina:

– Vit í tí irakska Jihad boða við hesum frá, at dómur Guðs er fullførdur, og at teir báðir italsku fangarnir eru avrættaðir, tí at italska stjórnin sýtti fyri at gera eftir kravi okkara. Samstundis ávara vit Italia um, at vit fara at halda fram við álopum okkara, og at eingin útlendingur í Irak fær frið, stóð í kunngerðini á heimasíðuni.

Italsku myndugleikarnir søgdu í gjár, at tað var vónleyst at fáa váttan fyri, um kunngerðin var sonn ella ikki. Reuters skrivar, at tað hevur fleiri ferðir fyrr víst seg at vera trupult at fáa vissu fyri, at fólk veruliga eru avrættað, men at slíkar kunngerðir vanliga hava víst seg at vera rættar.

Fyrr í vikuni hava irakskir burturflytarar avrættað tveir amerikanarar, og teir hava hótt við at avrætta bretan Kenneth Bigley, sum bleiv burturfluttur saman við teimum báðum amerikanarunum. Skyldfólk hjá Bigley hava biðið bretsku stjórnina fáa gíslan leysan, men Jack Straw, uttanríkisráðharri, segði í gjár, at stjórnin fer ikki at tingast við yvirgangsmenn.

# Ivasamar veljarakanningar

**Av tí at teir amerikonsku kanningarstovnarnir brúka ymsar hættir, veit eingin við vissu, hvat veljararnir veruliga halda**

VELJARAKANNINGAR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Forsetavalið fyri fýra árum síðani avdúkaði, at tey, sum høvdu ábyrgdina av valinum í Florida, høvdu ilt við at telja rætt. Nú vísir tað seg, at heldur ikki teir amerikonsku kanningarstovnarnir hava skil á, hvat veljararnir veruliga halda. Er George W. Bush langt framman fyri Kerry, ella stendur tað á jøvnum ímillum hann og John Kerry? Eingin veit tað við vissu.

Amerikanskir eygleiðarar siga, at tær neyvastu kanningarnar eri tær, sum flokkarnir sjálvir gera, men trupulleikin er, at teir vilja ikki avdúka úrslitið. Kortini halda eygleiðararnir, at Bush man liggja ímillum trý og fimm prosent framman fyri Kerry.

Men hetta er langt frá tí, sum kanningarnar hjá kanningarstovnunum vísa. Hjá Gallup fær Bush 55 prosent og Kerry 42, og New York Times gevur Bush 50 prosent og Kerry 42. Men í einari kanning hjá Pew-stovninum fáa teir báðir 46 prosent í part, og tað eru eisini kanningar, sum siga, at Kerry er eitt prosent framman fyri Bush.

Amerikonsku eygleiðarar siga, at veljarakanningarnar eru ikki líka álítandi sum fyrr. Teir vísa millum annað á, at fyrr ringdu stovnarnir til heimatelefonirnar hjá fólki, men í dag er vanligt, at teir ringja til fartelefonirnar uttan at kanna, hvør er í hinum endanum, hvaðani viðkomandi er, ella um viðkomandi er skrásettur sum limur í øðrum flokkinum.



# Um- og útbygging av Ósáskúlanum samtykt

**Aftaná eina langa prosess er ein um- og útbygging av skúlanum við Ósánna í Klaksvík fyri umleið 34 milliónir endiliga samtykt. Sitandi býráð hevur játtað og játtar so mikið av pengum at væl og virðiliga kann farast í gongd, og eftir ætlan verður arbeiði gjørt út í eitt**

UMBYGGING

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Í eitt longri tíðarskeið hevur skúlin á Ziskatrøð verið undir umfatandi umvælingum. Hetta arbeiðið er við at koma upp undir land nú, og eftir stendur skúlin í góðum standi. Næmingarnir hava fingið framúr umstøður, og øll fegnast um, at skúlin, sum einaferð stóð sum eitt skrímsl, nú er flottur og hevur fínar umstøður.

Nú letur til, at skúlin við Ósánna verður næst. Í øllum førum varð ein verkætlan samtykt á býráðsfundi týskvøldið, sum fer at hava umfatandi broytingar við sær.

Uppskotið um út- og umbygging av skúlanum er gjørt í samráð við starvsfólk og lærarar í skúlanum. Tað vil siga, at bygginevndin fór inn í skúlan at tosa við starvsfólkini og lærararnar og bóðu tey lýsa tørvin. Útfrá tí, sum tey søgdu, varð so uppskotið gjørt. Og týskvøldið varð tað so einmælt samtykt á býráðsfundi.



*Soleiðis fer partur av skúlanum við Ósánna møguliga at síggja út, tá út- og umbyggingararbeiðið er liðugt. Nýmótans innrætningur, har fakrúm og bólkarúm verða tøk*

*Tekning: Klaksvíkar kommuna*

### Fakrúm

Fyribilsuppskotið, sum Klaksvíkar býráð samtykti, gongur út uppá, at verandi skúli verður um- og útbygdur. Tað vil siga, at tá arbeiðið er liðugt, verður skúlin ein fultútbygdur tveysporaður skúli við plássi fyri 20 flokkum, sum kunnu verða í skúla samstundis.

Tað er ikki galdandi í dag, tí næmingarnir í fyrsta flokki ganga bert í skúla seinnapartar og í øðrum flokki fyrrrapartar. Hesir flokkar deilast sostatt um heimastovurnar.

Í verkætlanini eru sjálvsagt fleiri stovur. Skúlin verður uppbygdur soleiðis, at øki verða til tær ymsu deildirnar. Tað vil siga eitt øki til barnaskúla, eitt til miðdeildina og eitt til framhaldsdeildina. Fakhøli verða gjørd í kjallaranum av nýbygninginum, sum verður vestureftir, har lærugreinarnar undir Handaverk og List fara at halda til.

Ósáskúlin hevur í dag bert eina alisfrøðisstovu. Annars onga aðra serstovu.

Verkstaður verður til húsavørðin, bólkarúm verða, sum kunnu nýtast til bólkaarbeiði av ymsum slagi. Ein stór tónleikastova verður somuleiðis gjørd, sum gongur út til auluna.

Tekningarnar, sum Fuglø Arkitektar hava lagt eftir seg, síggja sera spennandi út. Og ongin ivi er um, at skúlin við Ósánna verður nýmótans, tá hetta stendur liðugt.

### Endiliga samtykt

Formaðurin í mentanarnevndini í Klaksvíkar býráð, Jórun Høgnesen, sigur, at hetta er fyrstu ferð, at eitt uppskot um út- og umbygging av skúlanum við Ósánna er samtykt. Hóast hetta eru triðju ferð, at eitt uppskot liggur á borðinum.

– Nú verður arbeitt í fullari ferð, og tað næsta stigið er at bjóða arbeiðið út, greiðir hon frá. Ætlanin er, at næmingarnir skulu ganga í skúla allatíðina, meðan arbeiðið fer fram.

Nær arbeiðið byrjar er ikki vist, men Jórun leggur dent á, at nú tað endiliga er komið so langt, so verður tað ikki steðgað.

Tørvurin á útbygging av Ósáskúlanum er langt síðani staðfestur. Nú er so ein verkætlan upp á 34 milliónir samtykt. So verður spennandi at síggja, hvussu skjótt arbeiðið kann gerast.

## Bygginevnd til nýggjan stovn

Á býráðsfundinum týskvøldið samtykti Klaksvíkar býráð at seta eina bygginevnd at koma við ítøkiligum ætlanum um at byggja nýggjan ansingarstovn.

Kommunan hevur tvey møgulig øki at velja í. Annað hvørt verður tað stykkið, sum kommunan eigur niðan fyri vegin undir Hálsi. Ella møguliga eitt øki frá nýggju útstykkingini undir Grashjalla. Tað veldst um, hvat øki verður fyrst tøkt.

Einaferð var talan um at nýta eini sethús á Grønabóli til ansingarstovn, men sum skilst er hendan ætlanin nú endaliga slept.

**- sae –**

## Nýggjan líkvogn

Klaksvíkar býráð samtykti eisini á seinasta býráðsfundi at játta 480.000 krónur til ein nýggjan líkvogn. Kommunan eigur annars tveir. Men tann eini er 5 ár, meðan hin er 17 ára gamal. Tað er sostatt hesin seinni, sum treingir til at skiftast út. Víst hevur verið á, at líkvognurin í Klaksvík skal klára brekkuna niðan úr kapellinum, sum setur nøkur høg krøv til motorin.

Líkvognarnir í Klaksvík verða ikki bert nýttir í Klaksvík. Teir verða ofta leigaðir út til eitt nú Eysturoynna.

**- sae –**

# Klaksvík á umhvørviskortið

**Komandi vikuskifti skipar Klaksvíkar kommuna fyri einari umhvørvisráðstevnu. Á skránni verða fyrilestrar av ymsum slagi, og er hetta, sambært Rana Nolsøe ein roynd liður í at skapa trivnað í býnum**

RÁÐSTEVNA

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Rani Nolsøe, formaður í Heilsunevndini í Klaksvíkar býráð, sigur, at hugskotið við einari umhvørvisráðstevnu í Klaksvík ikki er nýtt*

*Savnsmynd*

**Klaksvík:**
Leygardagin verður ljóskastarin settur á umhvørvið í Klaksvík. Kommunan skipar fyri einari ráðstevnu, har mangt og hvat verður á skránni.

Rani Nolsøe, sum er formaður í Heilsunevndini, sigur, at endamálið við ráðstevnuni er at fáa ljós sett á nøkur viðuskifti, sum fara at hava stóran týdning, tá undirsjóvartunnilin letur upp um tvey ár.

– Klaksvík kemur skjótt til eitt vegamót, og skulu vit skapa vøkstur, so mugu og skulu vit arbeiða við nøkrum møguleikum, sum gera, at vøksturin kann bera til, sigur hann.

Rani vísir eisini á, at tað verður tosað nógv um búskaparligan vøkstur, men tað heldur hann nyttar lítið, um ikki javnvág er í honum og vísir til týdningin av trivnaðinum í einum býi.

### Fyrilestrar

Ráðstevnan býður upp á fleiri fyrilestrar. Millum annað kemur høvuðsarkitekturin, sum var við til bæði at gera upprunauppskotið um miðbýarætlanina fyri Klaksvík og síðani seinni at endurskoða sama uppskot, at greiða frá hesi stóru ætlan.

Eisini koma umboð frá Grong kommunu í Noreg at greiða frá, hvussu tey hava arbeitt við teirra miðbýarætlan. Herundir serliga arbeiðshátt og hvussu tey bóru seg at vit at fáa fígging og politiska undirtøku fyri ætlanini.

Umboð frá donsku fyritøkuni Nyvig, sum hevur gjørt vegætlanina hjá Klaksvíkar kommunu fyri býin.

– Tann ætlanin verður løgd fram á ráðstevnuni, og viðkomandi kemur at greiða frá, hvussu týdningarmikið tað er at hava eina vegætlan serliga tá hugsað verður um øktu ferðsluna aftaná, at tunnilin hevur latið upp, sigur Rani Nolsøe.

Kári Purkhús, lívfrøðingur, fer somuleiðis at hava eitt upplegg á ráðstevnuni, har hann fer at tosa um týdningin av at varpa ljós á umhvørvið.

Rani Nolsøe, formaður í Heilsunevndini, heldur, at við at seta fokus á umhvørvið og seta nakrar ætlanir út í kortið, fara møguleikarnir fyri búskaparligum vøkstri at økjast mundi.

Umhvørvisráðstevnan verður leygardagin í skúlanum við Ósánna. Hon byrjar klokkan 13.

## Longt freistina

Á býráðsfundinum varð ein umsókn frá Klaksvíkar Badmintonfelag viðgjørd. Umsóknin var um at leingja freistina hjá teimum til at seta málið, um at lata eina nýggja badmintonhøll byggja, í verk.

Samtykt varð at ganga umsóknini á møti, og hevur badmintonfelagið sostatt fingið útsett freistina til 31. desember. Upprunaliga skuldi alt verða klárt tann 1. september.

**- sae -**